# Atlantsflog til Italia

**Atlantsflog fer í vetur at flúgva skíðrennarar millum Keypmannahavn og Verona í Italia. Møguliga verður eisini flogið til Italia í summar**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*



*Atlantsflog fer í vetur at flúgva skíðrennarar millum Kastrup og Norðuritalia. Gongur tað, sum leiðslan í Atlantsflogi vil, verður eisini flogið til Italia í summar*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:**
Atlantsflog hevur gjørt avtalu við eina danska ferðaskrivstovu um at flúgva ein túr um vikuna í vetur við skíðferðafólki milum Kastrup og Verona í Norðuritalia.

Magni Arge, stjóri á Atlantsflogi, sigur, at felagið byrjar at flúgva til Italia tann 10. januar. Síðan verður flogið hvønn leygardag fram til endan á mars.

Hetta gevur eitt gott íkast til felagið, sum serliga kemur væl við hesa árstíðina, tá annars er heldur soltið, sigur hann.

Tað er donsku ferðavinnuskrivstovuna Trier Ski, sum Atlantsflog hevur gjørt hesa avtaluna við.

Men um alt gongur eftir ætlan, kann tað henda, sigur Magni Arge, at eisini verður flogið til Italia í summar.

Arbeitt verður við at fáa ein avtalu í lag um at flúgva charterferðir til eina aðra floghavn í Italia við summarferðafólki.

Samráðingar eru í gongd, men nøkur avtala er ikki komin upp á pláss enn, sigur stjórin á Atlantsflogi.

Magni Arge sigur, at hetta slagið av flogførum, sum Atlantsflog hevur, er nógv eftirspurt júst til flúgving til skíðstøð. Talan er ofta um stuttar breytir í hesum floghavnunum, og tá er flogfarið hjá Atlantsflogi sera vælegnað.

Hendan flúgvingin nú í vetur verður so tikin sum ein roynd, og so verður sjálvandi roynt at sleppa at víðka hana komandi ár, sigur hann.

– Hetta er so avgjørt vert at byggja víðari á, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantsflogi.

Tað verður alla tíðina arbeitt við nýggjum møguleikum. Og eisini heldur nærri okkum sjálvum er Atlantsflog við í kapping um at fáa flúgving.

Norska oljufelagið Statoil byggir út í stórum í Norðurnoreg. Í hesum sambandi skal nakað væl av flúgving skipast úr Stavagner og norðureftir. Hetta liggur væl fyri, tí høgligt er at koma úr Vágum til Stavanger. So Atlantsflog er eisini við í tí kappingini, sum tó ikki enn er komin nakran veg sum so, sigur Magni Arge.

# Fleiri fólk og færri pengar

**Hóast Atlantsflog hevur flutt fleiri ferðafólk í ár enn í fjør, liggur minni eftir hjá felagnum, nú árið er farið**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Vágar:** Hóast endaliga uppgerðin ikki er liðug, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantsflogi, at minni verður eftir í kassanum í ár, enn tað var í fjør.

Kappingin í flogferðsluni harðnar alsamt, og tað gerst dýrari hjá feløgunum at flyta ferðafólkini, vísir Magni Arge á. So hóast ferðafólkatalið vaks, varð ikki so nógv eftir, sum ynskiligt kundi verið, sigur hann.

Atlantsflog hevur havt størri virksemi í ár, enn árini frammanundan. Fleiri túrar hava verið gjørdir. Men tað hevur kortini ikki merkt, at pengar koma í kassan beinanveg. Tí tað tekur tíð at byggja slíkar upp. Eisini hóast tað er á rutum, felagið røkir frammanundan. Eitt nú seinnapartstúrarnir til Danmarkar, hóast teir eru rímiliga nógv brúktir, sigur Magni Arge.

Hann fegnast um, at felagið hevur havt væl av flúgving millum onnur lond, sum hann málber seg. Her nevnir hann eitt nú charterflúgvingina millum Ísland og Grønland í summar sum eitt gott dømi.

Ferðingin hevur verið nógv nú um høgtíðirnar. Bæði undan jólum og millum jól og nýggjárs.




*Hóast ikki er endaliga uppgjørt, sigur Magni Arge, at Atlantsflog hevur flogið fleiri ferðafólk í ár enn í fjør. Men tað liggur minni eftir á kistubotninum, metir hann*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Minni tyrluflúgving

**Tyrluflúgvingin hjá Atlantsflogi hevur verið heldur minni enn undanfarin ár. Færri feðrafólk og minni at gera í alivinnuni eru onkrar orsøkir**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Vágar:** Tað merkist á tyrluflúgvingini hjá Atlantsflogi, at alivinnan er í trongum skóm. Nógv minni hevur verið at flutt seinnu tíðina, sigur stjórin á flogfelagnum.

Hvør av øðrum liva má, verður sagt. Og tá hóttafall kemur á ein, gongur tað út yvir tann næsta.

Soleiðis merkist tað væl á tyrludeildini hjá Atlantsflogi, at alivinnan í Føroyum er fyri hóttafalli í løtuni, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantsflogi.

– Tað hevur verið nógv minni at flutt fyri alivinnuna, enn vanligt hevur verið árini frammanundan, sigur hann.

Men eisini aðrastaðni merkist niðurgongd hjá tyrluni, sigur Magni Arge.



*Tyrluflúgvingin hevur av álvara merkt trongstøðuna í alivinnuni, eins og tað eisini merkist, at fólk eru flutt av útoyggjunum*
*Mynd: Edvard Joensen*

Eitt nú í ferðafólkaflúgvingini til útoyggjarnar.

Tað merkist væl, at fólk eru flutt úr Svínoy og Skúvoy. Gásadalur hevur fingið fast samband, so har verður ikki flogið meira.

Eisini á Mykinesrutuni merkist niðurgongd í ferðafólkatalinum. Ikki úr Vágum til Mykinesar, uttan millum Havnina og Vágar. Tí nú er fast samband um Vestmannasund, og so flúgva fólk ikki vestur í Vágar, um tey skulu til Mykinesar við tyrluni. Tey koyra vestur og flúgva so av flogvøllinum.

Oljuleitingin undir Føroyum hevur givið eitt sindur í ár. Men næsta ár er einki væntandi haðani, sigur Magni Arge.



# Inntøkan hjá fiskimonnum framvegis góð



*Hóast inntøkan hjá fiskimonnum er lækkað, er hon framvegis góð, sigur Óli Jacobsen í ársfrágreiðing síni, sum hann legði fyri landsfundin hjá Fiskimannafelagnum í fjár*

Hendan talvan vísir, hvussu inntøkurnar hjá fiskimonnum hava verið tey seinastu árini.

Talvan vísir miðaltøl fyri samlaðu hýruna hjá dekkara fyri tey seinastu 10 árini, og ber tí væl til at síggja gongdina.

Taka vit eina dagløn hjá arbeiðara, so er hon fyri ein 8 tíma dag kr. 865. Fiskimannafelagið sigur, at tað, sum er útyvir tað, er tað, sum fiskimaðurin fær eyka fyri yvirtíð, arbeiði sunnudagar v.m. Fiski-mannafelagið sigur, at í ár mugu vit ásanna, at trøini vaksa ikki inn í himmalin.

– Í fleiri ár er inntøkan hækkað, tí bæði fiskiskapur og prísir hava verið góðir . Men nú er prísgongdin vend, og hetta merkir lækkandi inntøkur fyri ein stóran part av flotanum. Men hetta er ikki óvæntað, tí hjá fiskivinnuni hevur altíð gingið upp og niður.Kortini ber ikki til at siga, at inntøkurnar í ár hava verið vánaligar.

Rækjuskipini eru tey, sum eru ringast fyri. Her er vent í holuni afturímóti fyri nøkrum árum síðani. Størstu broytingina hava ísfiskalínuskipini. Tað er ikki so øgiliga nógv ár síðani, at fægstu túrir undir Føroyum góvu meira enn minstuløn. Í dag gevur tað meira at sigla við línuskipi enn við ísfiskatrolara.

Hetta kann siga nakað um, hvussu ringt tað kann vera at meta um framtíðina, sigur Fiskimannafelagið. Seinastu árini hava inntøkurnar verið hesar í miðal upp á mannin um dagin, tá ið alt er talt við.

**Stórir ísfiskatrolarar:**

| | |
|---|---|
| 2003 | 1617 |
| 2002 | 1728 |
| 2001 | 1584 |
| 1994 | 830 |

**Smáir ísfiskatrolarar:**

| | |
|---|---|
| 2003 | 1478 |
| 2002 | 1855 |
| 2001 | 1892 |
| 1994 | 810 |

**Ísfiskalínuskip:**

| | |
|---|---|
| 2003 | 1826 |
| 2002 | 1732 |
| 2001 | 1483 |
| 1994 | 772 |

**Ídnaðarfiskitrolarar:**

| | |
|---|---|
| 2003 | 1037 |
| 2002 | 1240 |
| 2001 | 782 |
| 1994 | 888 |

**Nótaskip:**

| | |
|---|---|
| 2003 | 2847 |
| 2002 | 3743 |
| 2001 | 3849 |
| 1994 | 1187 |

**Rækjutrolarar:**

| | |
|---|---|
| 2003 | 1178 |
| 2002 | 1234 |
| 2001 | 1152 |
| 1994 | 880 |

**Hekkutrolarar:**

| | |
|---|---|
| 2003 | 1942 |
| 2002 | 2252 |
| 2001 | 1790 |
| 1994 | 1442 |

**Garnaskip á svartkalva- og havtaskuveiðu:**

| | |
|---|---|
| 2003 | 1383 |
| 2002 | 1421 |
| 2001 | 1686 |
| 1994 | 915 |

## Gongdin í ísfiskaveiðuni

Annars hevur gongdin hjá ísfiskaskipum hevur verið henda:

Sí talvu I

Tølini fyri 2003 eru fyribilstøl, gjørd upp eftir avrokningum, sum eru innkomnar pr. 9/12-2003.

## Munandi batnaðir

Avgerandi fyri inntøkur fiskimanna eru teir prísir, sum fáast fyri fiskin. Sjálvandi er tað avgerandi, hvussu stórur partur av fiskinum er bílgur fiskur og, hvussu stórur partur er dýrur fiskur. Men annars hevur gongdin verið hendan tey síðstu 20 árini:

Sí talvu II.

**Talva I**

| Ár | Veiða um dagin | menn | Kilo upp á mannin | Ár | Veiða um dagin | menn | Kilo upp á mannin |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| (Línuskip) | | | | (Partrolarar) | | | |
| 1976 | 3431 | 16 | 214 kg | 1986 | 4000 | 6,4 | 620 |
| 1993 | 2250 | 14 | 161 | 1993 | 3350 | 6,4 | 523 |
| 2001 | 3340 | 13,6 | 246 | 2001 | 6587 | 7,5 | 878 |
| 2002 | 4519 | 13,6 | 332 | 2002 | 6878 | 7,4 | 929 |
| 2003 | 5119 | 14,1 | 363 | 2003 | 6931 | 7,6 | 912 |
| (Smáir trolarar) | | | | (Stórir trolarar) | | | |
| 1978 | 3200 | 6,5 | 492 | 1977 | 6170 | 13 | 475 |
| 1993 | 3420 | 8,4 | 407 | 1993 | 4740 | 12,8 | 370 |
| 2001 | 4013 | 5 | 803 | 2001 | 6131 | 10,6 | 578 |
| 2002 | 4588 | 5 | 918 | 2002 | 7731 | 10,6 | 729 |
| 2003 | 2881 | 5 | 576 | 2003 | 6088 | 10,5 | 580 |

**Talva II**

| | Smáir trolarar | Stórir trolarar | Línuskip |
|---|---|---|---|
| 1983 | 4,89 | 4,34 | 5,24 |
| 1993 | 4,46 | 6,52 | 7,59 |
| 2001 | 6,63 | 9,76 | 15,61 |
| 2002 | 6,30 | 8,72 | 13,22 |
| 2003 | 4,94 | 9,85 | 12,81 |
| **Hækking/ lækking:** | | | |
| 1983-2003 | 1% | 127% | 144% |
| 2001-2003 | -25% | 1% | -18% |
| 2002-2003 | -22% | 13% | -3% |

# Fiskimenn hava sagt sáttmálan upp

**Sáttmálin ímillum Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið er sagdur upp og samráðingar skulu vera um nýggjan sáttmála**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið skulu aftur nú til samráðingarborðið.

Tað er greitt, eftir at Fiskimannafelagið hevur sagt sáttmálan við reiðarafelagið upp.

Sáttmálin varð undirskrivaður 6. mai í 2002 og kundi sigast upp til 1. desember í ár og tað varð hann. Kortini er sáttmálin framlongdur til 15. januar.

À landsfundinum hjá fiskimannafelagnum í gjár greiddi Óli Jacobsen, formaður í Fiskimannafelagnum, frá teimum málum, sum eru uppi í tíðini.

Hann segði, at tað mest nýskapandi í sáttálanum, sum kom í gildi í fjør, var, at nú hava fiskimenn eisini fingið eina eftirlønarskipan.

Frá 1. juli 2002 var inngjaldið í eftirlønargrunnin 25 krónur um dagin. Av teimum rindaði fiskimaðurin 10 krónur. 1. juli í ár fór gjaldið upp á kr. 47, og av hesum rindar fiskimaðurin tær 20 krónur. Restina rinda reiðararnir.

## Stytt túralongd

Ein onnur stór broytingin var í túralongdini. Fram til seinasta sáttmála var hon í mesta lagi 4 mánaðir. Men tað hevur leingi verið greitt, at hetta var ov leingi. Men frá 1. januar 2003 er túralongdin ásett til í mesta lagi 3 mánaðir.

– Hetta er so ein góður bati, men vit rokna hetta bert at vera eitt stig á leiðini at fáa túralongdina enn longur niður, sigur Óli Jacobsen.

Annars hevur trivnaðurin umborð fekk stórt pláss í sáttmálanum, sum er í gildi. Í hesum sambandi verða eisini skyldur lagdar á fiskimenn.eitt nú skulu teir velja trygdarumboð, og tað skal ikki roykjast í felagshølum umborð.

Somuleiðis skulu skipini útvega útgerð, so tað ber til at hoyra útvarp v.m. gjøgnum serligar hoyriverndarmóttakarar.

Óli Jacobsen sigur, at hetta verður longu gjørt á nøkrum skipum, men hendan ásetingin fer ætlandi at gera sítt til, at hetta fer at verða galdandi fyri allar.

## Nýggur sáttmáli

Formaðurin í Fiskimannafelagnum sigur í ársfrágreiðingini, at tað, sum má gerast til ein komandi sáttmála, er at endurmeta tey øki, sum eru í sáttmálanum, sum er.

Fyri eftirlønina er tað ein spurningur um krónutalið, sum skal gjaldast inn, er tað rætta og um lutfallið millum fiskimenn og reiðarar er tað rætta.

– Viðvíkjandi túralongd er tað spurningurin, um vit skulu longu nú fara í holt við at fáa hana enn longur niður. Viðvíkjandi trivnaðarmálum er tað ein spurningur um, í hvønn mun ásetingarnar í sáttmálanum eru fylgdar. Men tað stendur eisini til fiskimenn sjálvar at fylgja við og at gera vart við seg, um sáttmálin ikki verður fylgdur.

Men Óli Jacobsen sigur, at sjálvsagt eru tað eisini onnur mál, sum skulu takast upp, hann sigur, at eitt, sum Fiskimannafelagið hevur frætt um, er, at lógin um frítíð hjá fiskimonnum í veruleikanum er við at verða sett úr gildi.

– Hetta kunnu vit ikki lata um okkum ganga. Her vilja vit gera vart við, hvat sjómanslógin sigur:

Manningin á fiskiskipum hevur, tá ið viðurskiftini ikki gera tað ógjørligt, rætt til 8 tíma hvíld um samdøgurið, soleiðis at 6 tímar av hesi hvíld verða óbrotnir. Á trolarum eigur manningin tó rætt til 6 tíma vaktarskifti. Undantak kann í einstøkum førum verða gjørt, tá ið meirilutin av manningini kemur ásamt við skiparan um hetta.

– Hendan lógin skal sjálvsagt haldast. Og er nakað í mannagongdini umborð á skipunum, sum ger, at menn javnan vakja í óhugnaliga nógvar tímar, so má hetta rættast, sigur Óli Jacobsen.

## Fiskimannafelagið

Væl av fólkið møtir á landsfundi hjá Fiskimannafelagnum og nú standa sáttmálasamráðingar fyri durum. Óli Jacobsen, formaður felagsins, sigur, at nú verða tey mál tikin upp, sum ætlanin er at bøta í nýggja sáttmálanum.